# Gøtunøvn komin til Kunoyar

**Tvær føroyskar bygdir aftrat hava nú fingið gøtunøvn síni góðkend. Men enn eru øll gøtunøvnini í til dømis Havn og Klaksvík ikki endaliga góðkend.**

GØTUNØVN
*Snorri Brend*

**Kunoy:** Hóast hetta skuldi verið loyst fyri langari tíð síðani, eru enn fleiri kommunur sum ikki hava ásett gøtunøvn og adressur sínar.

Í roynd og veru er talan um kommunur, har umleið helmingurin av øllum íbúgvarum landsins búgva.

Onkur heldur kanska, at tær smáu kommununar eru eftirbátar í hesum arbeiðinum, tí tær ikki hava orku og manning at seta hetta í verk. Men fleiri av størru kommununar hava heldur ikki fingið hetta í rættlag.

Ein uppgerð frá Matrikulstovuni vísir, at til dømis Tórshavnar kommuna og Klaksvíkar kommuna hava sjálvsagt hava adressur. Men tær hava fingið boð um at gera ávísar broytingar, áðrenn tær kunnu góðkennast.

Hinvegin hevur Kunoyar kommuna nú fingið síni viðurskifti í rættlag.





### Gøtur og vegir

Í Kunoyar kommunu eru tvær bygdir – Kunoy og Haraldssund.

Nú skulu íbúgvararnir í báðum bygdunum – og onnur við – venja seg við fleiri viðurskifti:

Nú eitur tað ikki longur har uppi, har suðuri ella niðri á Bakka. Tey skulu nú venja seg við at ein vegur bæði í Kunoy og í Haraldssundi eitur Kunoyarvegur, at ein vegur í Kunoy kallast Kunoyargøta, og at ein vegur í Haraldssundi eitur Bakkavegur.

Í Haraldssundi ber heldur ikki til longur at siga, at: "Eg eri ávegis til tey Heimi við hús". Nú eitur tað ístaðin: "Eg eri ávegis eftir Garðagøtu ella Rasmusargøtu".

Kommunan hevur nevniliga gjørt av, at í Kunoy skulu vera átta gøtur og vegir, og at talið í Haraldssundi er sjey.

Hinvegin so hevur kommunan tikið avgerð um at varðveita tey gomlu húsa- og býlinganøvnini, hóast øll húskini skulu hava adressur.

Avgjørt er nevniliga, at hon fer at skráseta hesi gomlu nøvnini í Landsadressuskránni. Á heimasíðuni hjá Landsadressuskránni, "http://www.matrikul.fo/" www.matrikul.fo, ber til at síggja kort við veganøvnum, húsanumrum, býlinganøvnum og húsanøvnum

### Gøtunøvn í Kunoy og Haraldssundi

*Í Kunoyar bygd eru nú átta veganøvn.*
Hesi eru:
Kelduvegur
Millum Garðarnar
Niðan Viðarlund
Gilabrekka
Kunoyargøta
Kunoyarvegur
Lendingarvegur
Fløttarbrekka

*Í Haraldssundi eru sjey vegir.*
Hesir eru:
Fjøruvegur
Bakkavegur
Leitisvegur
Kunoyarvegur
Undir Hamarsenda
Garðagøta
Rasmusargøta

### Geilin er mest nýtta gøtunavnið

Matrikulstovan hevur gjørt eitt yvirlit yvir mest nýttu gøtunøvnini í føroysku postbygdunum.

Sagt verður, at listin kann eisini brúkast til at finna út av hvørji gøtunøvn helst ikki eiga at vera brúkt. Jú fleiri støð hava sama veganavn, tess størri er vandin fyri at mistøk kunnu verða framd. Serliga óheppið er tað, um sama gøtunavn finst fleiri ferðir í somu kommunu.

Listin yvir mest nýttu góðkendu gøtunøvnini er hesin. Hann er dagførdur 7. juli í ár.

| | |
|---|---|
| Gerðisvegur | 10 |
| Dalavegur | 10 |
| Geilin | 10 |
| Bakkavegur | 9 |
| Bøgøta | 8 |
| Heiðavegur | 6 |
| Garðavegur | 6 |
| Heygavegur | 6 |
| Skúlavegur | 6 |
| Dalavegur | 5 |
| Garðavegur | 5 |
| Hornavegur | 5 |
| Í Geilini | 5 |
| Kirkjugøta | 5 |
| Skákið | 5 |
| Traðarvegur | 5 |

# Migrena - hin burturtagda sjúkan

**Eitt er at hava ringa høvuðpínu. Annað er at hava sjúkuna migrenu. Roknast kann við at einir 2500 føroyingar kunnu hava hesa sjúkuna, sum fá teirra kortini tora at viðganga at tey hava.
Nú er ætlanin at seta sjóneykuna á hesa sjúkuna og tær avleiðingar sum henda hevur fyri børn, ung og vaksin.**

SJÚKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

- Vit eru nakrar kvinnur við migrenu, sum hava verið saman við jøvnum millumbilum fyri at tosa saman um sjúkuna..

- Men nú ynskja vit at lata almenningin fáa innlit í hesa sjúkuna, sum fá vita nakað um, men sum kortini rakar okkum so meint.

Soleiðis siga nakrar av teimum kvinunum, sum leygardagin 2. september fara at bjóða til fundar at greiða nærri frá hesi sjúkuni. Fundurin verður hildin í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Tær eru fult greiðar yvir, at mong ganga við hesi sjúkuni, men at tað ikki eru øll sum tora ella vilja viðganga at tey líða av migrenu.

Hetta skal tað nú bøtast uppá. Og tey dylja ikki fyri, at vónin er at kunna skipa seg saman í eitt felag fyri migrenu-raktu í Føroyum.

Skal ein ganga eftir hagtølunum so líða 5 % av fólkinum av sjúkuni. Mong meta tí, at hetta er ein sonn fólkasjúka!



### Tølini tala

Neyvan finnast nøkur føroysk hagtøl yvir tey sum hava migrenu í Føroyum. Øðrvísi er tó í útlondum.

Hagtøl úr Danmark vísa, at sjeynda hvør kvinna hevur migrenu. Hetta er tó ikki ein kvinnusjúka sum so, hóast tær eru fleiri enn menninir við sjúkuni.

Tølini vísa nevniliga eisini, at fimtandi hvør maður hevur migrenu. Uppaftur verri er tað, at fleiri og fleiri børn fáa migrenu.

Ilt er tó at fáa eygu á fólkini við migrenu, tí hetta er av einihvørjari orsøk eitt tabu-evni: Tey vilja ikki tosa um sjúkuna og heldur ikki vísa, at tey líða av henni.

- Tey halda, at tað ljóðar sum tvætl, tá tey siga seg at hava migrenu. Av somu orsøk fara tey heldur ikki til lækna við trupulleikanum, - tí, man hann trúgva teimum?, verður sagt.

Hinvegin vísir tað seg, at tað júst finst nútíðar heilivágur, sum kann hjálpa teimum flestu migrenuherðindunum.

Ein onnur fylgja av sjúkuni er, at migrena minkar um lívsvirðið hjá tí sjúka. Sum tikið verður til: Hvussu skal ein slíkur sjúkur persónur kunna vera fyrikomandi og vinarligur, tá tað buldrar í helminginum av høvdinum, rumblar í maganum og ljós og ljóð als ikki kennast góð?!

### Ynskja felag stovnað

Hesar føroysku kvinnurnar hava sæð sín egna trupulleika, og eru so líðandi komnar at kenna umstøðurnar hjá hinum kvinnunum, sum eru úr øllum pørtum av landinum.

- Vit eru komnar saman og hava tosað um okkara støðu. Á henda hátt hava vit fingið góð ráð og nyttugar royndir frá hinum.

- Ja, hetta hevur gjørt, at vit ikki føla okkum so einsamallar í dag, siga stigtakararnir til fundin.

Júst hetta við at kenna seg einsamalla ella einsamallan er ein av stóru trupulleikunum hjá teimum migrenu-sjúku.

Tí hevur danska migrenufelagið - Migræneforbundet - júst hetta sum sítt vørumerki: Við felagnum ert tú ikki einsamallur!

Hetta vørumerki ætla tær føroysku kvinnurnar við migrenu nú at varpa ljós á. Tí vóna tær, at nógvar kvinnur og nógvir menn verða við til hetta fyrsta tiltakið av slíkum slagi.

*Migrena er ein fólkasjúka sum rakar sjeyndu hvørja kvinnu og fimtanda hvønn mann*